Veðrið

Fimm – daga-forsøgnin frá DMI

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Gul til stívt andøvsgul av vestri, skýggjað og eitt skifti vátaslettingur ella regn. Hitin veksur upp í 3 til 6 stig.



Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Lot av ymsum ættum, seinni veksur hann vindin upp í stívt andøvsgul av suðri. Smáregn av og á, men sunnudagin klárar sum frálíður í. Hitin millum 4 og 8 stig.



Veðrið mánadagin og týsdagin:
Lot til andøvsgul, yvirhøvur av vestri, og sólglottar. Hitin millum 4 og 8 stig, um náttina um frostmarkið í støðum.

Stór bókmentaskrá yvir føroysk verk útkomin:

Frá Lucas Debes til Norðurlanda-húsið í Føroyum

Bókin *Works in English from and about the Faroe Islands, an annotatet bibliography* eftir týsku Føroyavinirnar *Norbert B. Vogt og Uwe Kordeck* er komin út. *Føroya Fróðskaparfelag* stendur fyri útgávuni. Í bókini, sum er ein bókmentaskrá av teimum mest fullfiggjaðu, eru 2665 enskir tittlar á føroyskum verkum, heilt frá Lucasi Debes til Norðurlandahúsið í Føroyum.

Føroyar hava ein stóran vinaskara úti í heimi, ein vinaskara, sum tó ikki altið sær seg føran fyri at lesa ella skilja tað føroyska málið. Samstundis verður tó heilt fitt av føroyskum bókmentum, yrkisbókmentum eins væl og umsettar fagurbókmentir, givnar út, fyrst og fremst á enskum. Í nevndu bókmentaskrá eru ikki færri enn 2.665 heiti á føroyskum bókum, ritgerðum og umtalum, sum øll eru útkomin á enskum. Alt hetta eru heiti á verkum, sum viðgera eitthvørt føroyskt evni, annaðhvørt útkomin her á landi ella uttanlands.



Tað er eitt megnararbeiði, Norbert B. Vogt og Uwe Kordeck hava greitt úr hondum við hesi bókmentaskrá. Umframt at hava trálisið tey almennu føroysku yrkisbókasøvnini, hava Vogt og Kordeck eisini verið ígjøgnum tey stóru útlendsku. Tí hetta er einasti vegur, vil tú tryggja tær, at bókmentaskráin gerst so fullkomin sum gjørligt, og eisini evnir um, ikki minst, teir eldru tittlarnar orðarætt endurgivnar. Slíkt arbeiði gerst ikki í eini handavending. Norbert B. Vogt og Uwe Kordeck fóru undir at geva út eina bókmentaskrá við týskum tittlum um Føroyar, og tað var hetta arbeiði sum birti upp undir áhuga teirra at fara í holt við eitt verk um tær ensktmæltu Føroyabókmentirnar.

Umframt teirra dagliga starv, eru Norbert B. Vogt og Uwe Kordeck virknir í týska-føroyska vinafelagnum, sum m.a. gevur út týskt-mælta limablaðið *Tjaldur*, við Norbert B. Vogt sum ritstjóra. Í summar kom blað nr. 18. Í blaðnum *Tjaldur* fáa Føroyar nógva rósandi umtalu, hendingar her heima, umsettar greinar um føroysk evni, umrøða av bókmentagávum o.s.fr. Eitt undranarvert frítíðararbeiði hjá Føroyavinum, sum ikki hava nøkur ættarsambond higar. Og eitt rósverdugt arbeiði, sum á ongan hátt skal undirmetast, júst í Týsklandi, har t.d. hesi seinastu árini hevur verið ein stór herferð ímóti grindadrápi.

Tað er tí at vóna, at henda bókmentaskrá fær stóra útbreiðslu eisini uttanlands. Hon er annars ein sjálvsøgd jólagáva hjá yrkisáhugaðum í familjuni og vinum og kenningum uttanlands.

Bókin er í stórum broti og telur 238 bls. Kápan er skrýdd við málningi av Mykines bygd eftir listamannin S. J. Mikines. Í føroysku bókhandlunum fæst bókin fyri kr. 395,-.

Eitt hátrýst yvir Grønlandi og Íslandi breiðir seg til Føroyar. Eystanfyri hátrýstið rekur køld luft av norði móti Føroyum. Eitt veikt lágtrýst vil fríggjadagin fara um Føroyar av útnyrðingi, so veðrið eitt skifti verður eitt sindur lyggjari.

Í vikuskiftinum vil eitt lágtrýst ferðast fra Hvarvinum til Íslands og eitt brúgvalag haðani vil geva regn í Føroyum.



Hitalagið mált frá 22./10. kl 06⁰⁰–23./10. kl 06⁰⁰. Hitin í gjár: 3,4°C
Minsti hiti máldur í oktober.: -4,0° Hægsti hiti máldur í oktober.: 18,4°



Avfallið: 0,1 mm – mált frá 22./10. kl 06⁰⁰–23./10. kl 06⁰⁰
Avfallið higartil í oktober: 94,1 mm

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	-7
Nuuk	2
Qaqortoq	9
Ammassalik	1
Saint John's	–
Halifax	–
Reykjavik	4
Seyðisfjørður	2
Tórshavn	4
Lerwick	6
Aberdeen	9
London	12
Tromsø	+1
Bergen	6
Oslo	9
Stokkhólm	5
Keypmannahavn	8
Helsinki	+1
Moskva	2
Berlin	5
Warzawa	5
Kiev	6
Bukarest	10
Paris	10
Madrid	19
Róm	21
Malorca	26
Athen	20
Malta	24
Tunis	25
Beijing	13
New Dehli	24
Bangkok	33
Jakarta	32
Sydney	22
New York	11
Miami	–
Los Angeles	20
Meksikobýur	–
Panama	–
La Paz	16
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	24

Kelda: DMI

STRANDA BIO
★ TLF. 48160 ★
Telefonsvararin stendur altíð til

Fríggjad. 24.10. kl. 20³⁰
Leygard. 25.10. kl. 20³⁰
Sunnud. 26.10. kl. 20⁰⁰
Seinasta sýning

Komandi filmur:
31. oktober: **Barbara**
Forsølan av atgongumerkjum til Barbaru er byrjað
31. oktober: **Volcano**
14. november: **The lost World**
14. november: **Lady & Vagabonden**

Hugnalig cafeteria

Vestfalskyrrindi

23. oktober: Seinna kvarter
27. oktober: Mánin longst frá jørðini

	Suðuroyar-/Vágafirði		Vestmanna-sundi		Nólsoyar-firði		Haraldssundi/Leirvíksfirði		Skúvoyarfirði/Skopunarfirði		Hestfirði/Sundalagnum	
	fp	sp	fp	sp	fp	sp	fp	sp	fp	sp	fp	sp
24. okt.	0221	1457	0421	1657	0036	1312	0236	1512	0121	1357	0136	1412
25. okt.	0319	1541	0519	1641	0134	1356	0334	1556	0219	1441	0234	1456
26. okt.	0301	1522	0501	1722	0116	1337	0316	1537	0201	1422	0216	1437
27. okt.	0342	1603	0542	1803	0157	1418	0357	1618	0242	1503	0257	1518